## Venesuela sendiharra í USA

Forsetin í Venesuela, Hugo Chavez, hevur gjørt av, at Venesuela skal aftur hava sendiharra í Washington. Avgerðina hevur hann tikið, eftir at hann hitti amerikanska forsetan, Barrack Obama, á toppfundi hjá teimum amerikonsku londunum, sum var í Trinidad um vikuskiftið. Viðurskiftini millum Chavez og fyrrverandi forsetan Geroeg W. Bush vóru vánalig, og á fundinum í Trinidad duldi Chavez ikki fyri, at hann heldur munandi meiri av eftirmanninum hjá Bush, sum sambært Chavez hevði ætlanir um at beina fyri venesuelska leiðaranum.



## Harðlig løgregla í Kina

Higartil í ár eru 15 fólk deyð, meðan tey hava verið í varðhaldi hjá kinesisku løgregluni, og mannarættindafelagsskapir finnast nú at framferðini hjá løgregluni og krevja nýskipanir. Blaðið Beijing Times skrivar, at sjey av teimum 15 vórðu bukað so illa, at tey doyðu. Tvey doyðu av óhappi, trý tóku lívið av sær, men tað er ógreitt, hvat hendi teimum seinastu. Mannarættindafelagsskapir og kinesiskir fjølmiðlar hava leingi lagt løgregluna undir alt ov harðliga framferð. Tey siga eisini, at fangar í kinesiskum fongslum fáa ringa viðferð, og at neyðugt er at nýskipa bæði løgregluna og fongsulsverkið.

# ALS útgjaldið tvífaldast

**Við vaksandi arbeiðsloysi og hægri útgjaldi fer ALS komandi árini at gjalda tvífalt so nógvan pening, sum skipanin fyrr hevur gjørt. Hetta er nakað miðallønt og fiskimenn koma at merkja best**

ARBEIÐSLOYSI
*Eirikur í Jákupsstovu*
*eij@sosialurin.fo*

Komandi árini fer útgjaldið hjá ALS helst at tvífaldast. Í løtuni letur ALS smáar 50 milliónir krónur í arbeiðsloysisstuðli um árið, men hækkar arbeiðsloysið til tey fýra prosentini, sum mann hevur roknað við, so fer skipanin minsta at lata 90 milliónir út um árið.

Hetta kemur bæði av vaksandi arbeiðsloysinum, men ikki minst av hægri útgjaldum.

Í løtuni er tað soleiðis, at ALS letur upp til 75 prosent av inntøkuni, ið hevur verið, og í mesta lagi 18.500 krónur um mánaðin. Tá broytingarnar eru gjørdar fer útgjaldið upp á 80 prosent, um hetta ikki er meira enn 20.000 krónur.



*Jóhan Dahl, vinnumálaráðharri, og Ernst Jacobsen, stjóri í ALS, greiddu frá broytingunum, ið millum annað hava við sær, at sjómenn standa betri, tá skipini eru til umvælingar*

*Mynd: Jens Kristian Vang*

Tað vil við øðrum orðum siga, at miðallønt kunnu gerast arbeiðsleys, og framvegis vinna 80 prosent av inntøkuni tey høvdu.

### Kostar nógv

Seinastu árini er upphæddin í ALS-skipanini vaksin heilt nógv. Í løtuni eru umleið 670 milliónir krónur í eginogn í skipanini. Broytingarnar koma saman við vaksandi arbeiðsloysinum at merkja, at ALS fer at gjalda umleið tvífalt so nógvan pening, sum hon higartil hevur gjørt.

Tað kemur at merkja, at skipanin fer at hava eitt hall á umleið 30 milliónir um árið næstu árini.

Tó eru onkrir postar, ið koma at lækka eitt sindur, tí utgjaldsdagarnir koma at lækka út 798 døgum til 648 dagar, og hetta gevur eina sparing, sum er undir 10 milliónir krónur.

### Betri fyri fiskimenn

Fyrr hevur tað verið soleiðis, at útgjaldið til fiskimenn hevur verið rættiliga avmarkað. Hetta hevur serliga verið í samband við, tá skipini hava verið til umvælingar.

Sambært tølum hjá ALS eru tað umleið 350 fiskimenn, sum árliga missa inntøku, tí skipini eru til umvælingar. Treytin er í løtuni, at reiðaríini mugu siga monnunum upp, áðrenn teir fáa útgjald út ALS. Hetta skal eisini broytast, so menninir kunnu fáa útgjald úr ALS í upp til 60 dagar, uttan at verða uppsagdir, meðan skipini eru til umvælingar.

Tó skulu teir vera tøkir á arbeiðsmarknaðinum í tíðarskeiðnum.

Somuleiðis skulu menn, ið sigla við langfarðarskipum, fáa møguleika at gjalda inn í ALS, og soleiðis eisini fáa útgjald, tá teir koma í land.

### Bíðidagar burtur

Í løtuni er tað somuleiðis soleiðis, at fólk skulu bíða í 10 dagar, áðrenn tey fáa útgjald úr ALS. Hesir dagar skulu nú takast burtur, so fólk hava eitt sindur betri møguleika fyri útgjaldi.

Eisini tey, ið fyrr hava verið sjálvstøðugt vinnurekandi fáa nú betri møguleikar, tí í løtuni fáa tey útgjald úr ALS eftir seinasta árið.

-Vit síggja, at sjálvstøðugt vinnurekandi stríðast til bitra endan, og tí fáa tey ofta eitt sera avmarkað útgjald, sigur Jóhan Dahl, vinnumálaráðharri.

Eisini skal skipanin broytast, so at útlendingar kunnu fáa møguleika at fáa útgjald úr ALS.

Hetta skal skipast soleiðis, at útlendingar skulu fáa upplýsingar, um hvussu tey skulu sleppa upp í ALS.

### Útaftur úr skipanini

Ætlanin er somuleiðis at leggja skipanina soleiðis til rættis, at fólk skulu fáa møguleika at koma útaftur á arbeiðsmarknaðin.

Hetta skal gerast við at ALS rindar arbeiðsplássum pening fyri at taka fólk inn.

- ALS skal ikki vera ein sovipúta, tí skipa mugu vit royna at fáa fólkini útaftur á arbeiðsmarknaðin, tá tey hava verið arbeiðsleys, vísir Jóhan Dahl á.

### Fyribyrgja fráflyting

Høvuðsendamálið við broytingunum í ALS, eru sambært vinnumálaráðnum, at mann skal fyribyrgja, at fólk flyta av landinum.

- Vit mugu hava eina skipa, sum ikki er verri enn tann hjá grannalondunum, sigur Jóhan Dahl. Hann greiðir víðari frá, at skipanin fer at líkjast skipanunum í grannalondum okkara rættiliga nógv.

# Stjól streym frá SEV fyri 90.000 krónur

**Ein maður er nú ákærdur fyri at hava stolið streym frá SEV í fleiri ár. Hann viðgongur at hava stolið streym, men hvørki so leingi ella so nógv, sum SEV og ákæruvaldið vil vera við**

STREYMSTULDUR
*Áki Bertholdsen*
*aki@sosialurin.fo*

Ein maður, sum setti búgv fyri nøkrum árum síðani, helt seg ordiliga hava funnið fidusin.

Hann fann út av at mingulera við málaranum hjá SEV so at mátarin mestsum helt upp at telja.

Men fidusurin var ikki meiri enn næstbest, tí hann varð uppdagaður og nú er hann ákærdur fyri umfatandi streymstuldur í gjøgnum fleiri ár.

Hann er ákærdur fyri at hava stolið streym fyri góðar 91.000 krónur í árunum frá 2004 til 2008.

Maðurin viðgongur at hann hevur svikað við máleranum hjá SEV fyri at fáa teljaran at mala spakiligari, men hann byrjaði ikki fyrrenn í 2007 og talan er sostatt eisini um eina nógv minni upphædd.

Hann greiddi frá í rættinum, at hann hevði frætt, at varð ein hátalari settur oman á málaran, spardi tað nógvan streym, tí magnetið í hátalaranum fekk teljaran at mala seinni.

Tað hevði hann roynt, men tað riggaði ikki.

Men so hevði hann funnið út av at stinga ein pinn inn í eitt hol á málaranum og tá bar til.

Hann segði, at hann hevði bara brúkt pinnin, tá ið hann hevði ein elekriskan ovn tendraðan fyri at hava tað heitt inni.

Úrslitið av tí var, at hann spardi rættiliga fitt, tí mátingar hjá SEV vísti, at hann brúkti ikki meiri enn góð 1000-1500 kilowatt um árið, ella 3-4 kilowatt um dagin, sum er ikki meiri enn ein fjórðingur av nýtsluni hjá einum vanligum húski.

Mátingar hjá SEV vísti á, at tað fyrsta hálva árið, hann búði í húsunum, hevði hann brúkt næstan 2000 kilowatt, men øll tey fylgjandi árini, var brúkið minkað niður á 1100-1500 kilowatt fyri eitt heilt ár.

Hann segði, at tað var tí, at fyrstu tíðina, hann hevði búð har, hevði hann brúkt nógv amboð, sum brúkti streym.

Hann hevði eisini havt eitt stórt akvarium, sum hevði brúkt nógvan streym tað fyrstu tíðina og kona hevði gikt, so hon mátti hava tað heitt inni og tí hevði hann eisini elektriskan ovn.

Tá ið SEV avdúkaði hann, fór nýtslan upp aftur á tað, sum kann minna um eina vanliga húsarhaldsnytslu.

Men nú hevði hann fingið flatskerm, fleiri akvarium og annað, sum kundi forklára streymnýtsluna.

Hann trúði ikki upp á mátingarnar hjá SEV. Men annars hevði hann havt eitt stórt akvarium, sum hevði brúkt nógvan streym tað fyrstu tíðina og kona hevði gikt, so hon mátti hava tað heitt inni og tí hevði hann eisini elektriskan ovn.

Men hann viðurgekk, at hann hevði snýtt frá 2007 og tað angraði hann, tí tað var skítbýtt, helt hann.

Málið er ikki viðgjørt liðugt, tí fleiri upplýsingar skulu fáast til vega, eitt nú um, hvussu nógva olju, hann hevur brúkt hesa tíðina.